# Kirkjuráðslimir og kirkjutænarar hittast



TÍÐINDASKRIV

Aftur í ár verður árligi kirkjufundurin í Eysturoynni. Kirkjufundurin verður sunnudagin 23. november kl.17.00 í Fuglafjarðar kirkju.

Seinastu 8 árini hava kirkjuráðslimir og kirkjutænarar saman við prestunum havt ein árligan fund, har ymiskt hevur verið á skránni sum hevur við kirkjuna og kirkjumál at gera. Mál, sum hava verið viðgjørd eru m.a. sangur og tónleikur í kirkjuni, gudstænastuskipanin, kirkjan og diakontænastan og børnini og tey ungu í kirkjuni.

Í Eysturoynni eru 15 kirkjur og 3 bønhús og 2 onnur støð í teimum 5 prestagjøldunum, har gudstænastur verða hildnar. Tað eru nógv fólk, sum eru knýtt til tey ymisku støðini: kirkjuráðslimir, deknar, urguleikarar og klokkarar. Øll hesi fáa nú høvi at hittast til fundar í Fuglafirði sunnudagin, sum eisini er seinasti sunnudagur í kirkjuárinum.

Kirkjufundurin byrjar við gudstænastu við altargongd í Fuglafjarðar kirkju sunnudagin kl.17.00 saman við prestunum í Eysturoynni. Øll eru vælkomin til gudstænastuna. Eftir gudstænastuna verður samkoma fyri kirkjuráðslimum og kirkjutænarum í kirkjukjallaranum.



*Teir, ið tóku prógv eru (aftast frá vinstru) Svenning Borg, Andreas Ludvig, Einar Hammer, Jákup V. Joensen og Byrgir Jacobsen. Frammanfyri sita Don Petersen, undirvísari, og próvdómari Kai Vágfjall*

*Mynd: D. Olsen*

# Fingu LRC prógv

**Á kvøldskúlanum í Vági tóku menn hóskvøldið LRC prógv, ið gevur rætt at passa GMDSS útgerð við fiskiskipum á øllum heimshøvum**

SJÓVINNA
*Dagfinn Olsen*
*dagfinn@sosialurin.fo*

Teir ið tóku prógv eru Svenning Borg, Andreas Ludvig, Einar Hammer, Jákup V. Joensen og Byrgir Jacobsen. Lærari er Don Petersen og próvdómari Kai Vágfjall.

Nýtt verður bók, sum Don Petersen hevur lagt til rættis, og sum Føroya Skúlabókagrunnur gevur út. (Ískoyti til GMDSS GOC- og LRC lærubók. Global Maritime Distress & Safety System).

Prógvið gevur rætt at passa alla GMDSS útgerð á fiskiskipum á øllum heimshøvum.

Vágs Køldskúli er einasta stað í Føroyum, tó undantiknir Vinnuháskúlin í Havn og Klaksvíkar Sjómansskúli, har til ber at taka hetta prógv.




# Jólaboð í 68 ár

Eitt av teknunum um at jól eru í hondum er blaðið Jólaboð, sum KFUM í Havn gevur út 68. árið á rað.

Inngangin í Jólaboð hevur Símun Jacobsen, prestur í Hvalba skrivað. Umframt hetta eru fleiri siðsøguligar greinir, søgur og yrkingar, sum ymiskir høvundar hava skrivað.

Kápumyndin er av ferðamannaskipinum Tjaldur hjá DFDS á Tvøroyri. Myndina, sum Sigurd Valdemar Hansen tók í 1912, vísir eisini Tvøroyrar kirkju, sum varð vígd fýra ár frammanundan, og sum fylti 100 ár fyrr í ár.

Guttorm Zachariasen hevur lagt Jólaboð til rættis. Tað hevur 84 síður og kostar 100 krónur.

